# Vandi fyri arbeiðssteðgi leggur flakavirkið lamið

**Fiskavirking á Tvøroyri keypir ikki fisk, so leingi vandi er fyri at skipini hjá Strandferðsluni verða løgd**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Vandin fyri at skipini hjá Strandferðsluni fara at verða løgd av verkfalli, ávirkar nú eisini fiskivinnuna í Suðuroy.

Fiskavirking á Tvøroyri keypir ikki fisk aftur, fyrrenn tað er avgreitt, at siglingin kemur at halda fram ótarnað.

Í dag fara Skipara- og navigatørfelagið á fund, saman við semingsmonnunum, at samráðast um nýggjan sáttmálan.

Talan er um sáttmála um yvirmenninar við Strandferðsluni og fiskirannsóknarskipinum, Magnusi Heinasyni.

Eydnast tað ikki at finna semju, verða skipini hjá Strandferðsluni, løgd, saman við Magnusi Heinasyni.

Meinhard Jacobsen, stjóri á Fiskavirking, sigur, at so leingi hóttanin um at skipini hjá Strandferðsluni verða løgd, verður fiskur ikki keyptur til flakavirkið á Tvøroyri.

– Vit kunnu ikki keypa fisk at arbeiða, tá ið vandi er fyri, at vit ikki sleppa av aftur við hann, sigur stjórin í Fiskavirking.

Hann sigur, at soleiðis sum Suðuroyggin liggur fyri, slepst ikki undan, at flakavirkini koma at liggja lamin, tá ið vandi er fyri at skipini hjá Strandferðsluni verða løgd.

Hann sigur, at arbeiðssteðgirnir og støðugu hóttarnar um arbeiðssteðgir, eru avgjørt steinur omaná byrðu hjá fiskivinnuni í Suðuroy, einsvæl og aðrastaðni í landinum.

– Tað er ivaleysa tungt frammanundan, so afturvendandi ósemjunum á arbeiðsmarknaðinum, hava vit avgjørt ikki brúk fyri, sigur hann.

Í hesum sambandi kann vísast á, at Smyril er bundin at fýra fakfeløgum. Manningin er limur í Skipara og navigatørfelagnum, Maskinmeistarafelagum og Starvsmannafelagnum. Teir, sum taka ímóti endanum og loysa á Drelnesi eru limir í Føroya Arbeiðarafelag og teir, sum taka ímóti endanum og loysa í Havn, eru limir í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hvørja ferð okkurt av hesum fimm fakfeløgunum er uppi í eini ósemju á arbeiðsmarknaðinum, er Smyril hóttur við verkfalli.

Soleiðis eru tað ikki tríggjar vikur síðani, at vandi seinast var fyri, at hann varð lagdur, ta ferðina var tað maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið, sum samráddust.




# Gongur striltið at taka avgerð um Tinganes



*Tórshavnar Kommuna ætlar at dýpa framvið Tinganesi fyri at gera atløgupláss til nýggja Smyril inni a Bursatangan, uttaná Norrønu. Myndin vísir bæði skipini við bryggu. Teir dimmu litirnir eu teir, sum skulu dýpast. Myrkari liturin er tað, sum neyðugt verður at sprongja, men ljósari liturin er tað, sum kann gravast*

**Jógvan á Lakjuni hevur útsett at taka avgerð um Tinganes skal friðast út á 10 metrar, ella ikki**

ØKISFRIÐING
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Tað gongur striltið hjá Jógvani á Lakjuni at taka avgerðina , antin Tinganes skal økisfriðast út á 10 metra dýpi ella ikki.

Tað hevur leingi verið sagt, at avgerðin skuldi takst fyrsta dagin, men enn er ongin avgerð tikin.

Og landsstýrismaðurin í mentamálum sigur nú við Sosialin, at avgerðin er útsett eitt sindur. Avgerðin verður sostatt ikki tikin heilt enn.

Hann sigur kortini, at tað verður ikki leingi til avgerðin verður tikin.

Jógvan á Lakjuni vil ikki gera fleiri viðmerkingar til málið. Hann sigur, at hann skal seta seg inn í ymisk viðurskifti, áðrenn hann tekur støðu, men hann vil ikki siga, hvørji viðurskifti tað eru, sum skulu kannast.

Hann vil ikki siga um tað er avgerandi fyri um avgerðin fellur annan vegin ella hinvegin, hvørjir møguleikar annars verða fyri at herberga nýggja Smyrli í Havn

Men hann hevur áður sagt, at tað liggur í kortunum, at hann fer at taka undir við tilmælinum frá fornminnanevndini, sum er sakkønm á økinum, um at økisfriða Tinganesn.

Hann hevur umrøtt málið í Landsstýrinum og har er eisini yvirhøvur semja um at tað er rætt at økisfriða Tinganes sambært tilmælinum frá Forminnanevndini.

Hann segði eisini við Útvarpið í gjár, at hann ætlaði at taka málið fyri aftur á Landsstýrisfundi, áðrenn endaliga avgerðin verður tikin.




## Almannastovan

## Fosturfamilja til pinkubarn

Søkt verður við hesum eftir fosturfamilju til 2 mdr. gamla gentu. Roknast má við at barnið hevur tørv á at verða til fosturs yvir eitt longri tíðarskeið.

Neyðugt verður at annað av fosturforeldrunum verður heima hjá barninum til tað er uml. 1 ára gamalt. Ein partur av uppgávuni hjá fosturfamiljuni er at viðvirka, tá ið foreldrini skulu hava samveru við barnið.

Samsýning verður veitt til fosturforeldur eftir galdandi reglum.

Av tí at málið hevur skund, er freistin at søkja tann 23. apríl 2004.

Áhuga kunna fáa nærri upplýsingar við at venda sær til

**Almannastovuna**
Barnaforsorgardeildin
**att.: Beinta Festirstein, tlf. 353510**

## Summarhús til leigu

Hús í Norður-Jútlandi, uml. 30 min. frá Ålborg og 10 min. frá strond.

Ring og hoyr nærri.

**Tlf. 44 72 64**

## Landsliðsvenjari í hondbólti

Søkt verður eftir landsliðsvenjara til A-landsliðið hjá monnum í hondbólti. Seinasta freist at søkja er 4. juni 2004. Umsóknin skal sendast til:

**HSF**
**Postboks 1023 · 110 Tórshavn**
**Tlf. 319669**

## Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Sosialurin 341800

## Lærlingur

til Elding í Tórshavn

Elding søkir eftir lærlingi til handilin í SMS at byrja beinanvegin.

Elding er førandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert lærupláss í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi.

Tú ert ágrýtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS ella HH.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 1. mei 2004 og skal sendast til:

**Elding, Postboks 1289, 110 Tórshavn**

Nærri upplýsingar um læruplássið fáast frá Majbritt E. Winther á tel 3196 97.

ELDING
- EIN BETRI LOYSN!

## Heimarøktin í Norðoyggjum

## Avloysari

Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi beinanvegin ella eftir avtalu. Talan er um eitt hálvtíðarstarv fram til 31.12.2004, mest í dagvakt við einkultum kvøldvaktum. Arbeitt verður 4 hvørt vikuskifti.

Søkt verður eftir einum starvsfólki við heilsufakligari útbúgving 28 tímar um vikuna í Náttarvakt á Sambýlinum á Heygnum frá 1. juni 2004.

Hevur tú hug at brúka tína útbúgving og førleika og í einari skipan, sum er í støðugari menning og broyting, so er hetta eitt starv fyri teg.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er 1. mai 2004.

Umsókn við neyðugum prógvum skal stílast til:

**Heimarøktin í Norðoyggjum**
Att: Elsba Lützen · Bøgøta 34 · 700 Klaksvík

## Blandistøð til sølu

Um hóskandi boð fæst er ein fullfíggjað blandistøð við bili, gravkúgv og øðrum til sølu.

**Sp/F EHS-BETONG**
FO-900 Vágur
Tlf. 218380

## Bilar til sølu

**Chevrolet Blazer Silverado 6,2 diesel**



prísur 95.000,-

· Árgangur 1992 · Km 111.500 · Automat gear · 4 WD · El-rútar · 5 setur · Radio · Tónaðir rútar. Vælhildin.

Sosialurin 341800

**Citroen Jumpy 2,0 TD Vørubilur**



prísur við mvg 120.000,-

· Árgang mai 1998 · Km 80.000 · Radio, el-rútar, nýlakkeraður, í sera góðum standi.

**Renault Mégane 1,6 Coupé**



prísur 49.500,-

· Árgang 1996 · Km 149.000 · 1,6 bensinmotor · Summardekk á sportfelgum · Radio og píkadekk fylgja við.

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 51 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

## Hølir í Tórshavn til leigu

Skrivstovuhøli til leigu.
Hølini er uml. 100 $m^2$ og er møguleiki fyri at víðka til 200 $m^2$. Hølini hava egna inngongd og møguleika til allar hentleikar sum t.d. toilet, køk. vm.

Eisini er goymsluhøli 200 $m^2$ til leigu. Høli hevur 2 portur sum eru 4,0 x 4,5 metur til støddar hvørt. Toilet og aðrir hentleikar eru í goymsluhølinum.

**Sosialurin**
**Box 76 · FO-110 Tórshavn**
**Bill.mrk. 609**